rumsterilsi kom burtur úr. Tað kom bæði í Ekstrablaðið og í svensk bløð, at »en fuld færing« hevði avvápnað donsku sjóverjuna í Norðuratlantshavi. Og tað varð eisini grinið at tí á næsta Nato fundinum sigst, sigur Ingi Mohr.

– Vit vóru 12 í viðgerð í Íslandi og av teimum liva átta edrúir í dag, hinir eru deyðir. Skjótt kom hugskotið, at tann hjálp, eg hevði fingið í Íslandi, eisini mátti koma føroyingum til góðar. Eini hús vóru til sølu á Velbastað fyri eina millión og Regin Olsen í Sjóvinnubankanum var so positivt innstillaður, at tað eydnaðist okkum at læna til húsini og 350.000 krónur at byrja viðgerð. Heimið læt upp í desember 1986.

– Eg havi starvast á Heilbrigdið í 21 ár, og tað er ongin ivi um, at hetta er ríkasta arbeiði reint menniskjansliga fyri meg í lívinum. Tað er einki so vælsignað fyri meg, sum at vera saman við edrúum alkoholikarum, sigur hann.

Tilvitskan um hóttandi sjúkuna, hann dregist við nú, vitjar aftur Inga og hann reisir seg knappur upp og leggur fløguna við sangum hjá »Pedir hjá Pola«, Petur Háberg, á ljóðanleggið. Og nú fyllist stovan við brúsandi sangi og stillum orgultónum, og vit lurta í tøgn eftir sanginum »Eg elski tær grøðandi hendur«.

– Tøl kunnu verða tolin, og tað hava umleið 4000 føroyingar verið í viðgerð á Heilbrigdið. Eg havi fylgt gjølla við og ført hagtøl, og eg veit, at í hvussu er 1600 av hesum liva edrúir í dag. Um vit siga, at eini tíggju fólk standa hvørjum einstøkum av hesum 1600 nær, so eru tað út við helvtin av øllum føroyingum, sum hava fingið gagn av rúsdrekkaviðgerðini á Heilbrigdi, og tað er slett ikki ein so galin kensla, nú farið er at halla undan á lívsleiðini, sigur Ingi Mohr.

Ingi er djóravinur burturav. Tann yvirstóru brúnsvarti amerikanski bul-doggurin Maja kemur inn í stovuna og heilsar upp á húsharran og undirritaða, áðrenn hann leggur seg á eitt teppi, fullkomiliga eitt við hesa løtuna. Hvíti puddilin Pjusk er eitt sindur meira varin, snoddar varisliga mínar buksubrøkur, sum allarhelst anga av Siv og Loka, sum eru okkara hundar heima. Seyðahundurin Viggo kemur eisini inn í stovuna. Hann er blindur og 17 ára gamal og hvílir fullkomiliga í sær sjálvum. Hann heilsar eymliga upp á Inga, og teirra eygu møtast, sum teir hjartavinir teir eru, síðan kemur hann yvir til mín og gongur yvir móti tí eina av teimum trimum flygelbeinunum, sum bera flygelið í stovuni »Kundi verið áhugavert at lyft beinið«, hugsar hann, kemur síðan í tankar um, hvar hann er, umbestemmar seg og leggur seg í løtuna.

## Tøgnin er lekjandi

– Eg elski tøgnina í dag. Hatta orðatakið, at tungur er tigandi róður passar slett ikki. Gud talar til mín gjøgnum tøgnina. Hann talar mest til mín gjøgnum náttúruna, gjøgnum vøksturin, gjøgnum tutlið í ánni. Og hann er nær hjá mær her á trøðni, sum eg keypti frá abba fyri 100.000 krónur í 1967. Eg havi havt ótrúliga stóra gleði av hesum blettinum í Havnini, sigur Ingi, tá ið vit heilsa farvæl næstu tíggju minuttirnar.

– Og tað er tøgnin, sum dregur meg suður á Skarvanes, har eg eisini havi hús, skoytir hann uppí.

Inni á sofaborðinum stendur blanka kaffikannan, og fatið við bollunum hjá Annu er hálvtómt. Oman á bollunum liggur leskiligt tilreitt føroyskt smør, góður ostur og reyð piparfrukt. Ingi hevur ikki etið nakað serligt, meðan við hava prátað og málningaportrettini á veggjunum hyggja mungandi eftir bollunum. Ingi er listaelskari og hvør veggur er prýddur við virðismiklum málningum, sum bert eru kám kopi av veruliga lívinum uttanfyri í náttúruni.



***Í stovuni hjá Inga hava túsundtals alkoholikar sitið ristandi og skelvandi, áðrenn teir eru farnir í viðgerð. Heimið hjá Inga hevur verið opið fyri mongum, sum hava livað á botni í samfelagnum***

*Tekstur: Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Mureldur/Sunva Eysturoy Lassen*